# <nýtt - nýtt>

3arin <nýtt - nýtt>

## Harry Potter og hemmelighedernes kammer



**Høvuðsleiklutir:** Daniel Radcliffe, Rupert Grint og Emma Watson
**Longd:** 155 minuttir
**Prod. ár:** 2002

## Spirit



**Longd:** 80 minuttir
**Prod ár:** 2003

Teir somu, sum hava gjørt Shrek, venda her aftur við einum filmævintýri, sum øll skulu síggja. Fylg við tí villa, unga rossinum Spirit. Hann fer út á eina dramatiska ferð fyri at gera tað ómøguliga – at bjarga sínum heimstaði og afturvinna heimstaðin. Á síni djørvu og spennandi ferð í stóru villmarkini í USA verður Spirit vinur við ein ungan Lakota-krígsmann, snýtir flog flogfaraldið og forelskar seg í vøkru ryssuni Rain. Spirit er ein ógloymandi forteljing um at finna dirvi í sær sjálvum.

## K 19 The Widowmaker



Árið er 1961 og tað Kalda Kríggið millum USA og Sovjet er uppá tað hægsta, meðan heimurin heldur andanum við hóttanini um eitt atomkrígj. Harrison Ford spælir tann sovjetiski kavbátayvirmaðurin Alexei Vostrikov, sum yvirtekur leiðsluna umborð á atomkavbátinum K-19. Tann fyrsti yvirmaðurin, Mikail Polenin (Liam Neeson), er vorðin lækkaður í tign eftir hann hevur noktað at sjóseta K-19, tí báturin hevur alt ov stórar feilir. Myndugleikarnir herða á byggingina og vegurin hjá K-19 er raktur av eini røð av óhappum og manningin gevur bátinum eyknevni »The Widowmaker «.

Jomfrúferðin hjá K-19 gongur til Antarktis, har ein atomrakett skal royndarskjótast. Nær við av eina amerikanska herstøð hendir tað, sum ikki má henda – ein atomandgera køliskipan fer at leka. Vostrivok stendur brádliga einsamallur yvirfyri einum ómøguligum vali, at skula biðja arvafíggindan, USA um hjálp – ella at risikera eina niðursmelting, og harvið eina eksplosión, sum helst fer at útloysa 3. veraldarbardaga.

## Enough



Tann hartarbeiðandi servitrisan Slim (Jennifer Lopez) helt, at hon fór at fáa eitt lív innan fyri rammurnar í einum hjúnarbandi, tá hon gifti seg við Mitch (Billy Campbell), hennara dreymadrongi. Eftir at tey hava fingið teirra fyrsta barn, byrjar hennara fullkomna lív at niðurbrótast, tí tá uppdagar hon ta myrku síðuna hjá Mitch – ein sjúkliga øvundsjúkur og harðráðin persónur, sum broytir álit, eydnu og kærleika til ótta. Slim, sum er ræðsusligin og er bangin fyri lívinum hjá barninum, velur at flýggja við dóttrini. Men Mitch er náðileysur og setur ein kaldan leigusvein í starv í jaktini eftir tí vinningi, sum einaferð var hansara familja. At enda verður Slim noydd til at konfrontera veiðumanninum, og hon og Mitch kasta seg út í ein intensan og kropsligan bardaga, har Slim einaferð fyri allar, vil vísa honum, at hon hevur fingið nóg mikið!!

## Kate Ryan

**Heiti:** Different
**Skeringar:** 16
**Plátufelag:** Antler-Subway Records

## Madonna

**Heiti:** American Life
**Skeringar:** 11
**Plátufelag:** Maveric/Warner Bros.

## MTV Unplugged 2

**Bólkar:** Sting, Chris Isaak, R.E.M, Eric Clapton, Bob Dylan, Sheryl Crow, Elton John, Björk o.o.
**Skeringar:** 16
**Plátufelag:** Universal

## The Celtic Circle



Dupultfløga
**Bólkar:** The Corrs, Nightnoise, Anuna, James Horner, Night Wish, John Williams Clannad & Bono o.o
**Skeringar:** 16+16
**Plátufelag:** BMG

## Mótsetningar hittast

Beyoncé Knowles og 50 cent eru tað nýggjasta parið innan showbusiness heimin. Beyoncé Knowles úr Destiny's Child hevur sett sínar longu negl fastar í fyrrverandi kokain-seljaran 50 Cent, sum er sera nógv frammi innan rapp heimin fyri tíðina. Hann hevur eina fortíð millum gøtubandar í New York og er millum annað blivin skotin ikki færri enn níggju ferðir. Hann og Eminem eru vinir, so hann hevur eitt CV, sum ger, at hann er avbera vælegnaður til rap-hierarkiið.

Fyrr sást Beyoncé saman við Jay-Z, men hann er nú vorðin yvirháløur av 50 Cent bæði so og so.

Tað rann saman millum tey bæði, tá tey skuldu syngja eina duett, sum also helt fram í sovikamarinum, eftir at øll tól vóru sløkt.

Ein kann sanniliga siga, at her er talan um tveir mótsetningar, sum hittast. Tí Beyoncé nýtti sín ungdóm til at finna Gud, meðan 50 Cent sat í geglinum, so tey bæði munnu fara at hava ov mikið at tosa um.

## Madonna nærum handtikin

Madonna mundi verðið handtikin fyri barnaræning, tá hon ein dagin herfyri skuldi avheinta dóttrina úr skúlanum.

Madonna hevur altíð skift hár og stíl yvirhøvur sum onnur skifta hosur. Og nú ein dagin mátti hon so sanna, at tað ikki altíð er so smart at skifta í øllum førum hárlit. Hon hevði litað sær hárið myrkabrúnt, og tá hon kom í skúlan eftir dóttrini, vóru tað fleiri, sum ikki kendu hana aftur.

– Eg bleiv fleiri ferðir steðgað av lærarum og foreldrum, sum ákærdu meg fyri at stjala mína egnu dóttur. Onkur tók enntá í meg og spurdi, hvat eg var í ferð við, og hvar mamma gentuna var. Tað tók mær fitt av tíð at greiða teimum frá, at eg also var Madonna, greiðir Madonna sjálv frá.

Men hon sigur eisini, at hon skilir væl atburðin hjá fólki, hóast tað ikki var stuttligt hjá henni, meðan tað stóð uppá. Hon heldur, at hetta vísir, at fólk hugsa um Lourdes, og at mamma hennara er kend. Og tað fegnast Madonna um. Flestu fólk kenna Madonnu sum blondinu, men hon var faktiskt myrkhærd fyri nøkrum árum síðani. Tað er tó bara so langt síðani longu, at ongin minnist tað. Og tað er helst orsøkin til, at fleiri av foreldrunum reageraðu soleiðis.

Annars hevur Madonna júst verið búsitandi í Los Angeles, tí hon hevur verið við í sendiröðini Will og Grace, men tá tað var liðugt, segði hon við mannin hjá sær, at nú helt hon, at tey skuldu flyta aftur til Onglands.

– Hollywood er so keðiligt at búgva í. Okkum dámar væl í London, sigur Madonna, sum tó er bangin fyri at koyra í vinstru síðu.

## Jim Carrey er gírigur



Tað sigur fyrrverandi kona hansara, Melissa Womer. Hon sigur, at Carrey er óreinur við dóttur teirra, ta 15 ára gomlu Jane, tí hon fær ikki nóg mikið av lummapengum.

Onkur vildi kanska hildið, at 16.300 krónur um vikuna skuldi verið nokk hjá einum tannáringi til at fingið megin-partin av sínum útreiðslum dekkaðar, men ikki í teimum høpunum, har Melissa Womer ferðast dagliga. Hon hevur nú sent rættinum eitt umfatandi krav, har hon krevur, at Carrey rindar 2,3 milliónir krónur til útreiðslurnar hjá dóttrini.

– Eg tími ikki, at hon gongur og plágar meg um eykalummapengar, tá hann hevur ráð til at geva henni teir, sigur Melissa, sum varð sundurlisin frá Carrey í 1995 eftir átta ára hjúnaband.

Í kravinum frá Melissu stendur millum annað, at dótturin skal hava skíferiur, privatan skílærara, lívverja, rίðitímar og flogferðir á fyrsta klassa goldnar. Hetta eru alt fastar útreiðslur. Harafturat skal hon hava egið studium fyri knappar 1, 4 milliónir har hon skal kunna menna síni listarligu evni. Og eisini skal hon hava egna bil, sum kostar um milliónina, og har skal tryggingin sjálvandi eisini rindast. So íalt er kravið upp á góðar fýra milliónir krónur.

Tann 21. apríl skal rætturin taka støðu til kravið frá Melissu Womer. Hon er ikki í iva um, at hon vinnur sakina.

## Ben og J-Lo í Casablanca

Ben Affleck og Jennifer Lopez hava gjørt ein stóran sáttmála við at spæla høvuðsleiklutirnar í endurinnspælingini av stóra klassikaranum Casablanca.

Play it...kanska eru hesi bæði orðini úr filminum Casablanca tey kendastu í filmsheiminum yvirhøvur. Tey vórðu søgd av Humphrey Bogart í 1942, og nú bendir alt á, at Ben Affleck skal siga tey í eini lýsing, sum skal takast upp í Hollywood.

Til leiklutin hjá Ingrid Bergman hevur leikstjórin valt unnustuna hjá Ben í veruleikanum, Jennifer Lopez. Hon skal also vera tann, sum rýmir og letur Affleck standa einsamallan eftir við tveimum whiskey fløskum og tí myrka bartvørðinum, sum heldur enn fegin spælir " As time goes by " um aftur og umaftur á tí lítlu barrini í tí stóra, myrka býnum.

Nógvar røddir eru frammi um, at tey bæði tora avbera væl, tí tey eru farin í holt við hesa verkætlanina. Onkur heldur enntá, at tað kann fara at verða tað heilt stóra skrædlið fyri tey bæði, tí tey eru farin at pilka við tann kendasta filmin í søguni.

Men tey bæði eru ovurfegin um, at tey sleppa at sýna teirra evni fram í sama filmi. Um ikki annað, so kunnu tey vísa bankanum evnini, tí tey fáa í nánd av 200 milliónum krónum tilsamans fyri at leypa í leiklutirnar hjá Bogart og Bergman.

## Mariah Carey einsmøll í tvey ár

Hóast Mariah Carey má sigast at vera ein tann vakrasta og mest sexuta songkvinnan íheiminum, so hevur hon ikki havt eitt fast samband við nakað mannfólk tey seinastu tvey árini. Tann 33 ára gamla songkvinnan hevur sjálv gjørt av at liva í cølibat, eftir at hon og Luis Miguel fóru hvør til sítt.

– Eg havi sjálv valt at liva einsamøll, sigur hon.

– Nógv mannfólk síggja meg bara sum eitt sex objekt, sum teir vilja sleppa í song við, so teir kunnu reypa sær av tí aftaná. Teir eru slettis ikki áhugaðir í at læra meg at kenna sum persón. Og tað finni eg meg ikki í. Eg skal ikki uppfatast sum um eg eri nemm ella bílig, sigur sangfuglurin also.

Mariah Carey sigur, at tey mannfólkini hon hevur havt í sínum lívi, kunnu teljast á aðrari hondini. Hon livdi saman við Tommy Mottola í fimm ár, síðani fall hon fyri baseballspælaranum Derek Jeter og seinast var tað Luis Miguel. Eminem og 50 Cent hava annars gingið og reypað av, at teir hava báðir verið saman við songkvinnuni, men tað avsannar hon.

– Eg havi tosað við teir báðar einaferð, men hvussu teir fáa tað til nakað seksuelt, tað er mær ein gáta, sigur Mariah Carey, sum tó ikki hevur givið upp at finna kærleikan.

## Salma og Edward hava trupulleikar



Salma Hayek og Edward Norton eru eitt ómakað par. Tey eru sera ymisk. Hon elskar veitslur og Hollywood lívið, meðan hann heldur seg langt vekk frá ljóskastaranum.

Tað hevur givið teimum báðum stórar trupulleikar. Edward er vorðin troyttur av, at Salma rennur til hvørja veitslu og frumframførslu. So nú hevur hann givið henni tvey í at velja:

Antin kemur tú niður ájørðina og verður tú sjálv. Ella eru vit bæði liðug.

Tað hevur verið týðuligt fleiri ferðir, at tey bæði hava trupulleikar. Til dømis til Oscar handanina. Eftir sjálva handanina var ein døgurði, har tey bæði vóru við. Men Edward fór heim tíðliga, meðan Salma var eftir og helt á til langt út á náttina. Keldur vilja vera við, at hon bleiv meiri avslappað og glað, tá Edward var farin.

Salma Hayek er kend fyri at elska rampuljósið. Í Hollywood verður skemtað við, at hon hevði farið til upplatingina av einum bræbvjálva, um hon visti, at ein myndamaður fór at verða hjá og taka myndir av henni.

– Edward Norton kundi ikki verið meira mótsatt Salmu. Hann hatar alt ament, og tað er blivið ein trupulleiki fyri hann, at unnusta hansara elskar tað. Hjá Salmu er tað allatíðina eg, eg og aftur eg, og tað er hann nú vorðin troyttur av. Hann skammar seg simpulten av henni nú, siga keldur um parið.

### topp.10/cd-rom

01. Port Royal
02. Vietcong
03. Delta Force – Black Hawk Down
04. Soldier of Fortune 2 – Gold Edition
05. Anno 1503 – The New World
06. Heroes IV
07. Championship Mananger 4
08. Splinter Cell
09. C&C Generals
10. Rainbow Six 3 – Raven Shield

### topp.10/fløgur

01. Ymiskt – Now 3
02. Ymiskt – Stjerne for en aften
03. Madonna – American Life
04. Linkin Park – Meteora
05. Ymiskt – Re:play 2
06. Ymiskt – Celtic Circle
07. Ozzy Osbourne – The Essential
08. Celine Dion – One Heart
09. Ymiskt – Hits for Kids
10. T.A.T.U – 200 KM/H in the Wrong Lane

### topp.10/video

01. Harry Potter og hemmelighedens kammer
02. xXx
03. Ali G INDAHOUSE
04. Lilo & Stitch
05. 40 Days and 40 Nights
06. Iceman
07. K19 – The Widowmaker
08. Enough
09. Sum of All Fears
10. Mr Deeds

### topp.10/ps2 spøl

01. Splinter Cell
02. Metal Gear Solid 2: Substance
03. Rayman m
04. Spyro Enter the Dragonfly
05. The Getaway
06. Grand Theft Auto – Vice City
07. Iss 3
08. NBA 2K3
09. Time Splitters
10. The Sims

### topp.10/dvd

01. Spirit
02. Mr. Deeds
03. Harry Potter – Hemmelighedens kammer
04. xXx
05. Signs
06. Dragejægerne
07. Enough
08. Mortal Combat – Final Battle
09. Bourne Identity
10. Tilbage til fremtiden – trilogy box

3arin